15.06.2020

# Leistur fyri vitjandi á búeindum á eldraøkjunum í Føroyum – Covid 19

Gongdin í Føroyum hevur verið jalig í mun til smittu, og tí hevur verið meiri opið fyri vitjandi í seinastuni á búeindum á eldraøkinum. Frá 15. juni er vandi fyri, at smittan økist í landinum, tí landið slakar upp á smittufyribyrgjandi tilmæli/tiltøk til ferðandi til Føroyar.

Tað hevur verið ymiskt, hvussu høgt tal av vitjandi, eldrasamstørvini hava loyvt inni á búeindum og vitjaninar hava verið skipaðar ymiskt. – Eldrasamstørvini hava avgjørt frameftir at hava ein og sama leist, tá talan er um tal av vitjandi og nær hesi kunnu "skiftast út" við onnur vitjandi.

Frá 15. juni 2020 verður loyvt seks vitjandi at vera á vitjanarlistanum hjá hvørjum búfólki. Um ynski er um tað, ber til at skifta ein vitjandi út um vikuna, soleiðis at vitjanarskarin kann líðandi verða útskiftur aftaná 6 vikur.

Fysisku karmarnir, t.d. fermetratalið, er avgerandi fyri, hvussu nógv kunnu vitja ísenn, og gera ávísu eldraøkini leiðrelgur fyri tí.

Tað er framhaldandi umráðandi, at vitjandi skráseta seg, tá tey vitja, so tað lættliga ber til at spora smittuvegir, um tað gerst neyðugt.

**Vitjandi sum hava verið uttanlands:**

- Øll vitjandi, sum koma heim til Føroyar, verða biðin um at bíða við at vitja á ellis- og røktarheimunum/eldrasambýlum fyrstu 14 dagarnar eftir heimkomu – bæði tey, ið búgva uttanlands, sum koma til Føroyar, eins og tey, ið eru búsitandi í Føroyum og hava verið uttanlands.

- Eru serligar grundir til, at vitjanin ikki kann bíða í 14 dagar, verður mælt til at bíða við at vitja á ellis- og røktarheimum/eldrasambýlum til 7. dagin aftan á heimkomu og at lata seg testa 6. dagin eftir, at ein er komin til landið – talan er bæði um tey, sum búgva uttanlands og koma til Føroyar, eins og tey, sum eru búsitandi í Føroyum og hava verið uttanlands.

  Sama ger seg galdandi, um ein hevur verið til tiltøk, ið økja um smittuvanda, ella havt tætt samband við fólk, ið koma úr útlondum.

**Øll almenn tilmælir um sosialan atburð og reinføri skulu framhaldandi altíð haldast!**

Leisturin verður eftirmett so hvørt og í seinasta lagi tann 20. august 2020